

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 04 - 2013

# Oljustjórar í Kaffihúsinum í kvøld

I kvøld klokkan 19 verður høvi at hitta stjórarnar í føroysku oljufeløgunum, Ben Arabo fyri Atlantic Petroleum og Nils Sørensen fyri Faroe Petroleum. Haraftrat verða eisini stjórarnir í Bakkafrost, Regin Jacobsen, í BankNordic, John Rajani og í Atlantic Airways, Magni Arge. Teir eru stjórar í teimum fimm listaðu fyritøkunum í Føroyum. Hesaferð verður íleggjarafundurin í Tórshavn. Stjórarnir greiða fegnir íleggjarum og øðrum áhugaðum frá úrslitunum í 2012. Eisini kann ein nýta høvið at fregnast um framtíðarútlit og -ætlanir hjá fyritøkunum. Íleggjarafundurin verður hildin í Kaffihúsinum í Vágsbotni í Tórshavn mánadagin 8. apríl. Byrjað verður klokkan 19:00. Skráin er: Klokkan 19:00 VMF bjóðar vælkomin Klokkan 19:15 Bakkafrost leggur fram. Regin Jacobsen, stjóri Klokkan 19:45 BankNordik leggur fram. John Rajani, stjóri Klokkan 20:15 Atlantic Airways leggur fram. Magni Arge, stjóri Klokkan 20:40 Kaffisteðgur Klokkan 21:00 Faroe Petroleum leggur fram. Nils Sørensen, stjóri Klokkan 21:30 Atlantic Petroleum leggur fram. Ben Arabo, stjóri Klokkan 21:55 Endi Fundurin er ókeypis og almennur. Øll eru hjartaliga vælkomin stendur heimasiðuni hja Virðisbrævamarknaði Føroya